Til Noregs at royna fótbóltseydnuna

Hósdagin í farnu viku fóru John Heri Dam og Rúni í Soylu til Noregs, har teir komandi mánaðimir skulu royna seg í triðbestu norsku deildini

John Heri Dam er sjálvur annar farin til Noregs, har hann komandi mánaðimar skal royna fótbóltsevni síni. Saman við honum er Rúni í Soylu eisini farin til Øvre Årdal
Savnsmynd

JÁKUP MØRK

Leiðin hjá teimum báðum til Øvre Årdal í Sognefjord, her teir ætlandi skulu leika við Jotun, sum seinasta kappingarár flutti upp í triðbestu deildina.

Venjarin hjá Jotun man ikki vera heilt ókendur her á landi, við tað at hann í fleiri ár taldist millum bestu leikararnar her á landi.

Talan er sjálvandi um Kára Reynheim, sum fyri nøkrum árum síðani fór av landinum at nema sær venjaraútbúgving, og sum eftir hetta hevur virkað sum venjari hjá ymsum norskum liðum.

Ungt lið

Sum nevnt, so flutti Jotun upp í triðbestu norsku deildina seinasta kappingarár, og sambært Kára, so gekst teimum betur, enn hann hevði væntað.

Talan er nevnliga um nakrar sera ungar leikarar, sum eyðsæð hava góð fótbóltsevni, men sjálvur heldur Kári, at uppflytingin væl kundi bíðað í eitt ár, soleiðis at leikararnir høvdu fingið eitt sindur meira av royndum at dúva uppá.

Hetta er tó einki at iðra seg um, so ístaðin hevur Kári brotið upp ermar, fyri á tann hátt at syrgja fyri, at liðið er so væl fyri gjørligt, tá kappingin fer at byrja.

Ein liður í hesum fyrireikingum hevur so verið at styrkt um hópin, og tískil hevur hann vent eyguni móti heimlandinum, fyri at vita um ikki onkur styrkur var at finna har.

Okkum hevur ikki eydnast at fingið orðlið á Kára, so úst hvørjar ætlanir hann hevur við teimum báðum, vita vit ikki. Kári hevur tó áður nevnt, at toppskjútti teirra nú er farin í annað felag, eins og hann eisini hevur nevnt at hann kundi hugsað sær ein leikara afturat til hvørja ketu.

Tískil er ikki óhugsandi, at hann ætlar at nýta Rúna í Soylu á miðvøllinum, meðan John Heri skal royna seg í álopinum, har hann leikti so at siga øll yngru árini, umframt at hann onkran dystin í vaksnamannadeildunum hevur leikt á hesum plássi.

Royndir menn

Verða royndir máldar í dystartali, so eru tað tveir lutfalsliga royndir leikarar, sum Kári nú hevur fingið í hópin.

Báðir leikararnir hava í fleiri ár leikt fyrstudeildarfótbólt her heima, og eitt nú hevur John Heri verið føroyameistari bæði í 1997 (B36) og í 1998 (HB).

Venja innandura

Sum skilst, so er ætlanin, at teir báðir í fyrsta umfari skulu vera í Noreg í einar tveir mánaðir, soleiðis at báðir partar fáa høvi at kunna seg um hvønn annan.

Sum vera man, so er veðrið ikki tað besta at venja fótbólt í nú, men hetta man tó ikki gerast nakar trupulleiki, tí sum frættist, so skulu teir venja í eini stórari høll í Sogndal, sum ikki liggur so langt frá Øvre Årdal. Sostatt er eisini líkt til, at føroyingarnir eisini fáa høvi til at heilsa upp á onkrar landsmenn, við tað at tríggir føroyskir landsliðsleikarar sum kunnugt skulu leika við Sogndal komandi kappingarárið.

Jú, føroyingarnir uttanlands gerast alsamt fleiri, og støðan gerst ikki verri av, at vit eisini hava venjarar, sum royna at gera um seg uttan fyri landoddarnar.

Máltindurin
1. deild kvinnur

Ioana Rápa	VÍF	96	(29)
Regina Rádó	VB	92	(29)
Vesna Tomajel	Stjørnan	81	(33)
Lotte Sørensen	Kyndil	75	(31)
Inga F. Danberg	Neistin	64	(20)
Sunrid Gleðisheygg	Tjaldur	63	(11)
Jacklin Durhuus	VÍF	62	(3)
Arnleyð Krosslá	VB	50	
Andriana Milodanovic	Stjørnan	49	(2)
Ann Hansen	Kyndil	47	(9)

Iana Rapa er framvegis størsti málslúkurin í føroyskum kvinnuhondbólti

1. deild menn

Sámal Joensen	VÍF	107	(19)
Heini Joensen	Neistin	102	(26)
Artur Johansen	StÍF	101	(23)
Áki Olsen	Neistin	95	(12)
John Petersen	StÍF	87	(21)
Petur Martin Johansen	KÍF	69	(22)
Ingi Olsen	VÍF	75	(6)
Bjarni Wardum	Kyndil	73	(18)
Halgir D. Olesen	H71	65	(5)
Jakob Jónsson	Kyndil	63	(1)

Støðan 1. deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 Stjørnan	1	1	-	0	-	0	318	247	71	11
2 VÍF	1	1	-	0	-	0	284	261	23	9
3 Kyndil	1	0	-	0	-	1	267	228	39	7
4 Neistin	1	1	-	0	-	0	226	230	-4	7
5 VB	1	0	-	0	-	1	271	286	-15	4
6 Tjaldur	1	0	-	0	-	1	199	313	-114	0

(StÍF hevur tikið seg úr kappingini)

Støðan 1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 VÍF	1	1	-	0	-	0	398	304	94	13
2 StÍF	1	1	-	0	-	0	385	329	56	13
3 Neistin	1	1	-	0	-	0	374	332	42	11
4 Kyndil	1	0	-	0	-	1	366	326	40	7
5 Tjaldur	1	0	-	0	-	1	316	402	-86	3
6 KÍF	1	1	-	0	-	0	282	371	-89	3
7 H71	2	0	-	0	-	2	333	390	-57	2

Viðmerking:

Gjøgnumskygni í nýtsluni

Svar til Kristian Magnussen, løgtingsmann

Í grein í Sosialinum 7. januar 2000 setur Kristian Magnussen, løgtingsmaður undirritaða henda fyrispurning:

Hevur ein landsstýrismaður loyvi til at lýsa kunngerðir um t.d. stuðul eftir forsorgar- og almannapensiónslógini, tá ið hesar kunngerðir væntast at viðføra eykaútreiðslur fyri landskassan fyri verandi fíggjarár uppá í minsta lagi kr. 5 - 6 mió, og hesin peningur ikki er avsettur á fíggjarlógini ella umbiðin/játtaður í eykajáttanarlóg ?

Í viðmerkingunum til spurningin, vísir Kristian Magnussen til kunngerð nr. 101 frá 20.12.1999 um stuðul til hjálparráð, har ásett er, at stuðul (upp til 1870 kr/mðr.) kann tillutast persónum millum 18 og 67 ár, sum fáa avlamisveiting, men sum missa hesa sum avleiðing av løgtingslóg um almannapensiónir o.a. Eisini nevnir KM aðrar líknandi kunngerðir, sum landsstýrismaðurin hevur í ætlan at fremja.

Til fyrispurningin skal viðmerkjast:

Fíggjarnevndarformaðurin hevur uppgáva at taka sær av leiðsluni av arbeiðnum í fíggjarnevndini. Arbeiði fíggjarnevndarinnar snýr seg í høvuðsheitinum um at taka støðu til at geva løgtinginum álit í uppskotunum til árligu fíggjarlógina og eykajáttanarlógir, sum lagdar verða fyri tingið í árinum, og annars í bráfangisførum at veita eykajáttan við teim sokallaðu fíggjarneyndarskjølunum.

Í høvuðsheitunum hava løgtingsgrannskoðararnir eftirlitið við, at stýrisskipanarlógin § 43 stk. 2, um at eingin útreiðsla má verða goldin uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Løgtingsgrannskoðararnir skulu sbr. stýrisskipanarlógini § 45 stk. 2 fara ígjøgnum árliga landskassaroknskapin og ansa eftir, at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin, og at eingin útreiðsla er goldin uttan heimild í fíggjarlógini ella aðrari játtanarlóg.

Eisini kann spurningurin leggjast fyri landsstýrismálanevndina, sum sbr. stýrisskipanarlógina § 38 hevur eftirlit við, at starv landsstýrisins verður útint á lógligan hátt.

Vísandi til nevndu ásetingar, fer undirritaði tí ikki at greina setta spurningin nærri, men mælir Kristian Magnussen til at reisa málið antin í landsstýrismálanevndini ella hjá løgtingsgrannskoðarunum, har hann í báðum førum er limur.

Halda játtanir

Alment kann annars sigast um spurningnin, at ein landsstýrismaður hevur skyldu til at halda givnar játtanir í fíggjarlógini ella eykajáttanarlóg sbr. stýrisskipanarlógini § 43 stk. 2. Landsstýrismaðurin hevur sostatt einsamallur ábyrgdina av, at givnar játtanir halda.

Sær landsstýrismaðurin, at givin játtan ikki fer at halda, liggur rættarlig skylda á honum alt fyri eitt at steðga nýtsluni soleiðis, at hon ikki fer upp um givnu játtanina.

Í slíkum føri skal landsstýrismaðurin:

- taka av kunngerð, sum gevur borgaranum rættarkrav uppá ávísa peningaupphædd,
- leggja fyri løgtingið uppskot um broytingar í lóggávuni, so borgarin ikki hevur somu rættarkrøv, ella
- leggja uppskot til eykajáttanarlóg fyri løgtingið, soleiðis at játtan fer at svara til nýtslu.

Verða hesar ásetingar fylgdar, fæst neyðuga gjøgnumskygnið í nýtslu landskassans. Niðurstøðurstøðan er eisini, at tað er eitt lógarkrav, at lógarbundnar útreiðslur altíð skulu síggjast á fíggjarløgtingslógini ella á eini eykajáttanarlóg.

Vinaliga
Bjarni Djurholm

Hví hvarv leiðslan í Javnaðarflokkinum av tingi?

Hans Jørgensen spyr so skilagott almenningin, hví handalagið á Javnaðarflokkinum er so vánaligt.

Hann spyr: *"Missir Javnaðarflokkurin síni mál á gólvið?"*

— og svarar: *" Mangt bendir á, at vit í Javnaðarflokkinum eru ov lin ella dovin, tá tað snýr seg um at standa saman um mong av teimum góðu málunum."*

Vit onnur kunna bara samtykkja í hesum og skoyta uppí, at afturat tí lina og dovna kemur tað yvirskipaða endamálið, so sum vit síggja tað. Ein miðvís primitiv ætlan um, at tað skal gangast einum og øllum — serliga teimum sjúku og veiku - so illa sum gjørligt, fyri at javnaðarflokkurin skal standa sum valkosturin til tað verandi.

Lat okkum bara taka tvey tey feskastu dømini um, hvussu aktiv leiðsla floksins er á økinum.

Formaður Javnaðarfloksins fekk fríggjadag fyrrapart - undan triðju viðgerð av fíggjarlógini mánadag - áheitan um at standa saman við einum manni úr hvørjum flokki um eitt broytingaruppskot, soleiðis at Suðuroyar Sjúkrahús fekk 1,8 mió.kr. eyka, fyri at fólk ikki skuldu sigast úr starvi.

Manningin, ið peikað varð út, var tann sama, sum stóð aftanfyri broytingaruppskotið um játtanina til at kanna maktaloysi í útjaðaranum. Hetta uppskotið varð samtykt.

Formaður Javnaðarfloksins svaraði ongantíð uppskotsstillaranum aftur, men møtti í tinginum 3 dagar seinni við einum samsvarandi broytingaruppskoti - tó bara saman við sambandsflokkinum.

Ja, hann var so bangin fyri, at uppskotið skuldi fáa undirtøku, at hann noktaði fyri at lata tann triðja andstøðuflokkin vera við.

Maðurin, sum meira enn nakar annar hevur tosað um breiðar semjur, ønti ikki samgongumanni aftur, og valdi tann eina andstøðuflokkin frá sum uppskotsstillara til at bjarga Suðuroyar Sjúkrahúsi eina hægri játtan.

Hann valdi ein so smalan skarað sum gjørligt fyri at tryggja sær, at málið skuldi falla. Hetta visti hann, tí at sama uppskot frá somu fólkum fall 3 dagar frammanundan.

Primitivu politisku ætlan síni trúgvur er hann síðani farin í bløðini at peika út syndabukkar fyri at fáa sjálvan seg og flokk sín fram í eitt betri ljós.

Annað dømi fingu vit í sambandi við hurlivasan um pensjónslógirnar, sum eisini Javnaðarflokkurin atkvøddi fyri, og ber fulla ábyrgd av.

Samstundis sum umboðini hjá Javnaðarflokkinum í trivnaðarnevndini skutu upp at hækka pensjónirnar við 25 mió. kr., hvarv formaður floksins saman við einum einum lítlum triðingi av flokkinum av tingi.

Hesin triðingurin av Javnaðarflokkinum var ikki tøkur, tá atkvøðast skuldi um hækkingina av pensjónunum, sum sami flokkur sjálvur skeyt upp.

Leiðslan í javnaðarflokkinum royndi soleiðis í ellivta tíma at tryggja sær, at einki grundarlag skuldi vera undir einari møguligari samtykt um at tryggja pensjonistunum 25 mió. kr. hægri játtan, og tað eyðnaðist henni.

Eitt greitt tekin varð sent løgtinginum um, at uppskotið frá javnaðarmonnunum í trivnaðarnevndini einans hevði kosmetiskan áhuga. Uppskotinum var sjálvandi ikki lív lagað, og tað fall.

Í fyrra førinum setti Javnaðarflokkurin politiskt nýtsluviðri á tey sjúku, og í seinna førinum vóru pensjonistarnir inntøkuførdir. Snildið floksins kom í fjølmiðlarnar, men ikki eitt orð um at leiðsla floksin syrgdi fyri, at málið varð mist á gólvið.

Afturat tí lina og dovna í javnaðarflokkinum, sum maðurin á gøtuni kallar tað, kemur also eitt dism av politiskum revakynstri, sum støðugt sannførir okkum um, at javnaðarflokkinum er ikki lív lagað, er ikki eitt hampuliga stórt tal av illa støddum, ónøgdum og villleiddum veljarum at taka av.

Hesum syrgir flokkurin av fullum huga og heilum hjarta fyri.

Moralurin er góður, og dupultmoralurin dupult so góður.

Hergeir Nielsen

Laksaútflutningurin tvífaldaður

Góði laksaprísurin seinastu mánaðirnar hevur merkt, at útflutninigurin í 1999 var væl størri enn væntа. Hetta kemur hinvegin at ávirka forsøgnirnar fyri útflutningin í ár.

Alarar hava seinastu mánaðirnar tikið allan tann fiskin, ið var búgvin at slakta, fyri at njóta gott av góða prísinum. Seinastu tølini vísa, at samlaði útflutningurin í 1999 kom upp á 34.416 tons av laksi og sílum í kruvdari vekt, sum svarar til uml. 41.000 tons í rundari vekt, móti 20.362 tons í 1998.

Meðaprísurin 23,5 kr

Enn eru ikki neyvar útroknningar gjørdar av meðalprísinum, men mett verður at hann hevur ligið um 23, 50 pr. kg. Hetta merkir, at útflutningsvirði í 1999 av alda fiskinum var uml. 950 mió. kr í mun til 430 mió. í 1998. Fyrr í ár var mett, at útflutningurin í 1999 fór at liggja um 35.000 tons í rundari vekt, og at útflutningurin fór at økjast til 48.000 túsund tons í ár 2000. Stóra og framskundaða tøkan í 1999 merkir, at útflutningurin í ár verður á sama støði.

Slíkar forskjótningar við marknaðarprísinum eru ikki óvanligar. Í 1998 hendi júst tað øvuta. Vegna vánaligan prís seinast á árinum, var slagt útsett til fyrra part av 1999. Útflutningurin í 98 var tí bert 20.362 tons í rundari vekt, meðan hann var 22.205 tons í 1997, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi.